# Nýtt spæl um orðadrátt

**Eitt nýtt borðspæl er komið í handlarnar. Talan er um spælið »Orðadráttur«, sum gongug út upp á at savna sær seks orð fyri at vinna spælið, og har tað er loyvt at ræna orð frá hinum spælarunum**

BORÐSPÆL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Borðspælið, ið nú er komið á føroyskum og er virðislønt í nógvum londum runt um í heiminum, sigst vera ógvuliga læruríkt bæði í staving og orðum. Umfram at vera stuttligt og spennandi er tað við til at menna spælararnar í føroyska málinum.

Spælið gongur í stuttum út uppá, at hvør spælari roynir at seta seks orð saman, og loyvt er at ræna orð frá hvørjum øðrum við at broyta týdningin av orðinum. Um so er, at ein spælari setir eitt orð saman, sum hini ikki kennast við, er føroyska orðabókin dómari. Um orðið stendur í orðabókini, verður tað góðtikið. Stendur orðið ikki í orðabókini, verða brikkarnir lagdir á spælibrettið, og næsti eigur spælarin eigur leik.

Orð mótspælarans kann rænast við at broyta og við at seta ein ella fleiri stavir til orðið. Eitt spæliumfar av Orðadrátti kann gerast upp á ein hálvan tíma um so er, at spælt verður við klokku.

Hóast Orðadráttur júst er komið til Føroya, er spælið væl kent runt um í heiminum og hevur verið metsøluspæl í til dømis Kanada, USA og Noreg. Spælið hevur vunnið fleiri virðislønir og fingið nógva góða umtalu.

Tað eru Pnina og Eyðun Dam í Kaldbak, sum geva spælið út á føroyskum. Fyribils fæst spælið í Rit og Rák og BR í Havn, men arbeitt verður at fáa tað í aðrar handlar úti um landið.




*Sum heitið sigur er nýggja borðspælið »Orðadráttur« ein kapping um orð. Spælið er virðislønt í fleiri londum*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin upp í skrið. Regn ella vátakavi av og á og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur av suðri. Regn fyrrapartin og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn ella vátaslettingur av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 2 og 6 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 2 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -- |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 20 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | -2 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 5 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 26 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 978 hPa. í Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.



**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/12 kl. $06^{00}$ – 10/12 $06^{00}$. Hitin í gjár: ° Minsti hiti máldur í desember: -10,5° - Mesti hiti máldur í november: 2,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 03/12 kl. $06^{00}$ – 04/12 $06^{00}$. Avfallið higartil í desember: 26 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

29. november Mánin longst frá jørðini
5. desember Fyrra kvarter
12. desember Fullmáni/ Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. des | 4:39 | 17:09 | 3:39 | 16:09 | 3:54 | 16:24 | 6:39 | 19:09 | 7:39 | 20:09 | 2:54 | 15:24 | 1:54 | 14:24 | 4:54 | 17:24 | 5:54 | 18:24 | 4:24 | 16:54 | 5:39 | 18:09 |
| 12. des | 5:39 | 18:09 | 4:39 | 17:09 | 4:54 | 17:24 | 7:39 | 20:09 | 8:39 | 21:09 | 3:54 | 16:24 | 2:54 | 15:24 | 5:54 | 18:24 | 6:54 | 19:24 | 5:24 | 17:54 | 6:39 | 19:09 |
| 13. des | 6:39 | 19:10 | 5:39 | 18:10 | 5:54 | 18:25 | 8:39 | 21:10 | 9:39 | 22:10 | 4:54 | 17:25 | 3:54 | 16:25 | 6:54 | 19:25 | 7:54 | 20:25 | 6:24 | 18:55 | 7:39 | 20:10 |
| 14. des | 7:42 | 20:12 | 6:42 | 19:12 | 6:57 | 19:27 | 9:42 | 22:12 | 10:42 | 23:12 | 5:57 | 18:27 | 4:57 | 17:27 | 7:57 | 20:27 | 8:57 | 21:27 | 7:27 | 19:57 | 8:42 | 21:12 |
| 15. des | 8:42 | 21:09 | 7:42 | 20:09 | 7:57 | 20:24 | 10:42 | 23:09 | 11:42 | - | 6:57 | 19:24 | 5:57 | 18:24 | 8:57 | 21:24 | 9:57 | 22:24 | 8:27 | 20:54 | 9:42 | 22:09 |




